umhvørvisstovan

# Burturbeining av asbest

**Asbest er eitt av teimum evnum sum kann verða sera vandamikið at umgangast og sum skal burturbeinast sum serliga dálkandi burturkast. Asbest er framvegis at finna nógvastaðni, serliga er vert at verða ansin undir niðurtøka og burturbeining av tak- og bygningsplátum og bjálvingartilfari.**

Upp til 1980 var nógv byggitilfar gjørt við m.a. asbesti. Asbest brennur ikki og tolir heilt nógvan hita og hevur tí eisini verið nógv nýtt sum armering, bjálving og brunavernd. Nýtsla av asbesti hevur stórt sæð verið bannað síðani fyrst í 80'unum, men framvegis kann roknast við, at komið verður fram á asbesttilfar í samband við umvæling og niðurtøku av bygningum. Undir umvæling ella upprudding eigur altíð at kannast, um talan er um asbesttilfar. **Asbesttilfar má ongantíð nýtast umaftur ella til onnur endamál. Tað skal burturbeinast.**

Asbest er sera heilsuskaðiligt og má burturbeinast við størsta varsemi. Tað serliga við asbesti er, at tað er samansett av ørgrynnu av smáum nálafibrum. Tí má serliga ansast eftir dustinum. Nálafibrini eru so smá, at tey lættliga seta seg í t.d. lungu og har elva til sjúkur, so sum krabba.

**Burturbeiningin skal fremjast sera varisliga. Asbesttilfar má ongantíð liggja og rekast ella leggjast í dunga saman við øðrum burturkasti. Rúgvan av niðurtiknum asbesttilfari skal beinanvegin leggjast í plastikk og leggjast soleiðis at tað ikki er vandi fyri at tað spreiðist ella at óviðkomandi koma at tí.**

**Asbest skal burturbeinast sum serliga dálkandi burturkast. Tað skal leggjast í tættan innpakning og latast IRF ella KB við frágreiðing um, at talan er um asbesttilfar.** Asbesttilfar skal leggjast á tyrvingarpláss, men skal hetta verða á serstakt øki á tyrvingarplássinum, og skal tyrvingin fara fram so varisliga at eingin ampi er av tí tyrvda tilfarinum.

Arbeiðseftirlitið hevur í fleiri ár arbeitt við trupulleikum í.s.v. asbest og tað finnast greiðar rætningslinjur fyri hvussu asbesttilfar skal handfarast (si umfarskriv frá Arbeiðseftirlitinum frá 1. septembur 1987). Amboð og arbeiðshættir, sum avmarka dust, skulu nýtast. Asbesttilfarið eigur at vætast væl áðrenn niðurtøku og arbeiðsøkið skal haldast reint. Arbeiðsøkið eigur harafturat at avskermast mest møguligt, og óviðkomandi eiga ikki at hava atgongd til arbeiðsøkið. Serlig arbeiðsklæði eiga at verða nýtt og mugu hesi ikki leggjast saman við øðrum klæðum.

### Dømir um hvar asbest finnst:

- Bjálvingartilfar, t.d. hevur asbest verðið nýtt í samband við rør, ketlar, ovnar og ventilatiónsleiðingar, hitaveksling (fukt- og hitaabsorberan) í ventilatiónsskipanum, eldbjálvan av stálkonstruktiónum og brandhurðum
- Tak- og bygningsplátur v.m., t.d. í klædningum á húsum og í takplátum (eternit), í innandura plátum til hita-, fukt- og ljóðbjálving, í papp og plátum til el-innleggjan og til undirmáttir undir plastgólvum.
- Fylla- og bindievni, t.d. í spartelmassa, pussi og mørtel.

Fyrstu ferð útgivin: 10.06.1996
Seintast dagført: 09.06.2010
Útgava nr.: 2



**Umhvørvisstovan** · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Føroyar · Tel +298 34 24 00 · Faks +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo